J.Nr.: 16/01074
Avgerð.nr.: 5
Dagfesting.: 21.desember 2016

Mál viðvíkjandi búplássi til borgara undir 67 ár við seinheilaskaða

Markamótsnevndini hevur fingið mál frá einari kommunu til støðutakan, dagfest 16. oktober 2016, viðvíkjandi borgara undir 67 ár við sokallaðum seinheilaskaða.

Upplýsingar í málinum og málsgongdin

Borgarin er diagnostiseraður við seinheilaskaða vegna langtíðar misnýtslu av rúsdrekka.

Læknaliga verður mett, at borgarin ikki er egnaður at búgva einsamallur, men at hann hevði havt tað best á einum sambýli.

Borgarin søkti 14. apríl 2015 Almannaverkið um trivnaðartænastu og búpláss.

Almannaverkið fráboðaði sína noktandi avgerð við skrivi dagfest 16.06.2015. Viðvíkjandi spurninginum um búpláss segði Almannaverkið:

"Mett verður í hesum føri, at røktartørvurin kemur framum tørvin á einum sosialpedagogiskum tilboð, sum Almannaverkið kann veita.
Mett verður út frá teimum avbjóðingum, sum tygum hava, at tygum fáa eitt betur bútilboð innan eldraøki, sum hóskar betur til tygara tørv."

Eisini vísti Almannaverkið á heildarheilsuváttan frá kommunulæknanum, móttikin 17.02.2015, har tað m.a. stóð.

"Hevði ikki verið egnaður til at búð saman við fleiri fólkum við sálarfrøðiligum trupulleikum, tí [borgarin] hevur tørv á stabiliteti."

Grundað á hetta metti Almannaverkið, at borgarin hevði tørv á røktartilboði og var ábyrgd hjá kommununi eftir lógini um heimatænastu, eldrarøkt v.m.

Avgerðin hjá Almannaverkinum bleiv kærd til Kærunevndina í almanna- og heilsumálum. Kærunevndin staðfesti við avgerð 16. desember 2015 avgerðina hjá Almannaverkinum um búpláss við tí grundgeving, at seinheilaskaði er at sammeta við Alzheimer v.m. og grundað á, at tørvur borgarans betri kann nøktast innan eldraøkið.

Kommunan upplýsir, at hon eisini fekk umsókn um búpláss á eldrabústovni frá borgaranum 8. oktober 2015, men umsóknin varð sýtt á upptøkufundi tann 4. nov. 2015 við teirri grundgeving, at upptøkunevndin metti borgaran ov ungan at búgva í eldrabústovni. Henda avgerðin varð ikki kærd.

Uppáhald hjá kommununi
Kommunan heitir á Markamótsnevndina um at viðgera hetta mál vísandi til:

1) At talan er um eitt mál um markamót, sum skal viðgerast eftir § 5 stk. 5 í lóg um heimatænastu og eldrarøkt v.m. í hesum føri markamót 3 sbr. markamótsskjalinum. Sambært punkt 4 – niðurstøða og tilmæli - eru kommunur og land samd um at meginreglan er, at kommunurnar hava ábyrgd av at veita fólkapensjónistum, sum hava tørv á støðugari røkt, búpláss, men kunnu í serligum føri víkja frá hesi meginreglu sambært § 14, stk. 2. Hinvegin hevur landið ábyrgdina av at veita persónum við týðandi likamligum ella sálarligum breki ella víðfevndum sosialum trupulleikum, og sum tørva hjálp og stuðul til vanligt dagligt virksemi, umframt møguliga røkt, búpláss sambært § 32e í forsorgarlógini
2) at persónar undir 67 ár við víttfevndum sálarligum ella kropsligum breki, í hesum føri seinheilaskað sostatt eiga at fáa pláss á bústovni eftir § 32e í forsorgarlógini, soleiðis sum praksis eisini var áðrenn útleggingina a eldraøkinum.
3) at kommunan ikki hevur skyldu til at veita tilboð eftir § 14 stk. 2 í eldralógini til borgarar undir 67 ár. At § 14, stk. 2 í lógini sostatt er ein undantaksregla og tí er ikki talan um eina skyldu, men eina heimild at veita tilboð eftir hesi grein til borgarar undir 67 ár, t.d

    a) um kommunan út frá eini fakligari meting metir, at tørvur er á støðugari røkt og at pláss á røktarheimi saman við eldri røktarkrevjandi borgarum er besta og einasta loysnin

    b) velur at raðfesta henda bólk

    c) hevur ein yvirkapasitet

    d) staðbundin viðurskifti tala fyri hesum,

    e) umframt møgulig atlit til sjálvsavgerðarrættin

Til 1. Markamótsnevndin er samd í viðmerkingunum um ásetingarnar í lógini um heimatænastu, eldrarøkt v.m. og Markamótsskjalið sum grundarlag fyri avgerðini. Kortini metir nevndin – hóast støðan hjá borgaranum eisini hevur eitt sosialt sjónarhorn – at í mun til forsorgarlógina er § 32 meira viðkomandi enn § 32 e. Seinast § 32 varð dagførd við løgtingslóg nr. 129 frá 19. desember 2014, sást í viðmerkingunum (sí Løgtingsmál nr. 37/2014), at endamálið var at "*tillaga verandi heimild at veita persónum við týðandi avmarkaðum sálarligum og likamligum førleika vardan bústað og virknistænastu", og at "vardir bústaðir" nú "verður nýtt sum yvirskipað hugtak, ið fevnir um búfelagsskapir, sambýli og røktarbústaðir*".

Til 2. Sama viðmerking sum til undir 1. omanfyri viðvíkjandi seinastu lógarbroytingini.

Til 3. Tað er rætt, at § 14, stk. 2, í Løgtingslóg nr. 121 frá 2014 um heimatænastu, eldrarøkt v.m., orðar seg so, at í serligum førum kann røktarheim ella eldrasambýli eisini hýsa øðrum røktarkrevjandi persóni enn fólkapensjónisti. Tað er skilligt, at slíkar orðingar kunnu leiða til ta

fatan, at § 14, stk. 2, hervið hevur ásett eina skipan, har kommunalu tænasturnar mestsum eftir vild kunnu veita frávik treytað av atlitum, ið ikki einans hava at gera við borgarans tørv, men eisini slíkar fortreytir sum raðfesting og yvirkapasitet v.m. hjá kommununi sjálvari.

Ímóti hesum talar kortini, at tulkingin hjá kommununi førir til eitt slíkt úrslit, ið Markamótsnevndin júst var ætlað at forða fyri, nevniliga einum ógreiðum ábyrgdarbýti millum land og kommunur, har kommunur kunnu handla, men noyðist ikki at gera tað, við tí úrsliti, at bæði land og kommuna hava ábyrgd. Fyri borgaran verður rættarstøðan tá bæði ógreið og ógjøgnumskygd.

Markamótsnevndin heldur tí, at § 14, stk. 2, má tulkast í ljósinum av yvirskipaðu ætlanini aftanfyri lógina, nevniliga at sleppa av við ógreiðu markamótini millum land og kommunur. Álitið frá Trivnaðarnevnd Løgtingsins í løgtingsmáli nr. 64/2013 frá 18. mars 2014 og broytingaruppskotið millum 1. og 2. viðgerð, ið m.a. fevndi um uppskotið til verandi § 5, stk. 5, sigur frá hesum.

Eisini kann vera víst á, at eitt berandi atlit í sambandi við útleggingina var, at borgarans tørvur heldur enn spurningurin um 67 ára markið skuldi vera avgerandi. Sí almennu lógarviðmerkingarnar, s. 22 undir yvirskriftini "Markamót [http://www.logting.fo/files/casestate/13951/064.13%20U.t.%20ll.%20um%20heimatanastu%20eldrarokt%20v%20m.pdf,"]

Í hesum ljósi má meiningin við § 14, stk. 2, vera at skila av og nágreina ein bólk av borgarum undir 67 ár, sum í mun til *røktartørv* er so sambærligur við røktarkrevjandi yvir 67 ár, at tað er rímiligt at javnseta hesar bólkar og – heldur enn at veita búpláss eftir § 32 í fororgarlógini – geva teimum undir 67 somu atgongd til røktarheim og eldrasambýli eftir § 14, stk. 2, í lóg um heimatænastu og eldrarøkt sum teimum yvir 67.

Avbjóðingin er síðan at nágreina henda bólk nærri.

Kriteriuni, ið síggjast í lógarviðmerkingunum, eru ikki serliga greið, men okkurt fæst kortini av vegleiðing. Undir yvirskiftini *Markamót millum bútilboð, veitt sambært hesi lóg, og bútilboð, veitt sambært forsorgarlógini*, s. 41, stendur

"Í hesum lógaruppskoti verður hildið fast við galdandi undantaksregluna um, at í heilt serligum føri kunnu borgarar undir 67 ár fáa bústað á røktarheimi ella eldrasambýli. Her verður serliga hugsað um fólk við kroniskum sjúkum s.s. Alzheimer, Sclerosu ella aðra neurologiska sjúku, sum viðføra, at tey eru røktarkrevjandi, ella fólk, sum eru doyggjandi, sum ynskja at fáa eitt plass á einum røktarheimi."

Líknandi verður sagt á s. 48 undir serstøku viðmerkingunum til § 14, stk. 2:

"Ásetingin inniber, at røktarheim ella eldrasambýli í serligum førum kunnu hýsa yngri borgarum, sum eru røktarkrevjandi og sum tørva røkt alt samdøgrið. Tað kann t.d. vera borgari sum fær eina demenssjúku áðrenn pensjónsaldur. Í slíkum førum er týdningarmikið at taka atlit til, hvørji tilboð annars eru tøk í økinum, bæði undir kommunalum og landsins myndugleika. Harafturat er týdningarmikið at taka atlit til ítøkiliga tørvin hjá borgaranum og hvørji ynski hesin hevur í mun til bústað og tænastu."

Um vit samanbera hesi atlit við ítøkiliga málið og støðuna hjá umrødda borgaranum, so er spurningurin, um tann borgarin er fevndur av § 14, stk. 2, í lóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m. við viðmerkingum, ella um hann rættari eigur at fáa bútilboð eftir § 32 í forsorgarlógini.

Tað er ikki lætt at gera av, hvat niðara markið er fyri § 14, stk. 2. Kortini má vera greitt, at § 14, stk. 2, kann ikki hava verið ætlað at fevna um øll røktarkrevjandi undir 67 við demensjúku, sclerosu ella aðrari neurologiskari sjúku. Var tað ætlanin, so skuldi lógin verið orðað so, at kommunurnar eisini hava ábyrgd av øllum røktarkrevjandi undir 67 ár, tí tey røktarkrevjandi, ið eru undir 67 ár, og ikki hava onkra demenssjúku, sclerosu ella aðra neurologiska sjúku mugu vera rættiliga fá. Var hetta ætlanin, so gav tað ikki meining, at § 14, stk. 2, segði, at "*í serligum føri kann røktarheim ella eldrasambýli eisini hýsa øðrum røktarkrevjandi persóni enn fólkapensjónisti*" (okkara undirstriking), og so gav tað heldur ikki meining, at eisini Markamótsskjalið er orðað so, at tilboð til borgarar undir 67 er eitt undantak til høvuðsregluna um, at kommunurnar einans hava ábyrgd av teimum røktarkrevjandi yvir 67 ár.

Sostatt noyðast vit at fylla lógina út og meta um, hvørjir bólkar undir 67 liggja innan fyri ávikavíst uttan fyri § 14, stk. 2.

Eftir okkara fatan er kjarnuøkið fyri røktarkrevjandi undir 67 ár, ið kunnu fáa búpláss eftir § 14, stk. 2, borgarar, ið hava sjúku, ið eldri fólk typiskt fáa, og sum er progressiv og degenererandi. Alzheimers og onnur sløg av demensi eru mest vanligu sjúkur í so máta, ið elva til, at persónur gerst óafturvendiliga og alsamt meira røktarkrevjandi. Sclerosa á seinni stigi er annað dømi.

Sokallaður alkoholdemensur – ella seinheilaskaði grundað á langtíðar misnýtslu av rúsdrekka – er ikki á sama hátt ein degenerativ sjúka sum hinar fyrr nevndu. Steðgar viðkomandi misnýtsluna og fer at liva sunnari, kann progressiónin steðga.

At seinheilaskaði fevnir yvir serstakar diagnosur, ið eru heilt ymiskar frá siðbundnum demenssjúkum, sæst aftur í, at tey aðrastaðni hava serligar deplar fyri seinheilaskadd, eisini relaterað til rúsdrekkamisnýtslu, har sjúklingarnir fáa viðgerð, ið er skraddaraseymað til teirra tørv.

Vit hava ikki slíkar deplar í Føroyum, men Almannaverkið hevur higartil við heimild í § 32 í forsorgarlógini varðað av búplássum til hendan bólk. Markamótsnevndin dugir ikki at síggja, at § 14, stk. 2, í lógini um heimatænastu, eldrarøkt v.m hevur flutt hetta øki frá landi til kommunur.

Praktisk atlit tala eisini ímóti, at ein so serligur bólkur sum seinheilaskadd skal fáa búpláss á kommunalu røktarheimunum. Hesi heim hava ikki nøktandi tilboð til hendan bólk, og hugsa vit um smærri tænasturnar kring landið, so er als ikki ráðiligt at bjóða einstaklingum við so serligum tørvi pláss á slíkum smærri vanligum røktarheimum.

Niðurstøða

Markamótsnevndin heldur vísandi til forsorgarlógina § 32, at umrøddi borgarin – givið at upptøkunevndin kemur til ta niðurstøðu, at hann hevur henda tørv – eigur at fáa tilboð frá Almannaverkinum um búpláss á heimi fyri seinheilaskadd.

Bárður Larsen (form.)

Ása Olsen

Katrin Danielsen